## Spælararnir stuðla Faxe

Tað gongur heilt illa hjá danska felagnum Randers FC í superliguni. Felagið, sum áður hevur gjørt um seg væl uppi á stigatalvuni liggur eftir 11 umfør aftast í superliguni, og stólurin undir venjaranum John Faxe Jensen er glóðheitur. Hjálparvenjari hjá honum er fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen. Nú siga spælarar, at teir stuðla venjaranum, hóast tað hevur gingið trupult.



## Chelsea-venjarin nøgdur

Venjarin hjá Chelsea var nøgdur við sítt lið, eftir at liðið vann toppdystin ímóti Liverpool í gjár. Fyri viku síðani tapti Chelsea heldur óvæntað 3-1 ímóti Wigan, men í gjár var Chelsea aftur í rætta lagnum. - Hesin dysturin vísir, at vit hava loyst okkara trupulleikar. Tað vóru ikki stórir trupulleikar, men tað var umráðandi fyri okkum at vinna hendan dystin, segði Ancelotti við SkySports.

### Neistin-KÍF 36-23 (18-11):

# Eingin ivi á Hálsi

**KÍF var ongan tíð í nær námind at hótta heimaliðið, sum uttan at imponera vann ein knúsandi stórsigur**




Jákup Mørk

Hóast málini vóru mong á Hálsi, so var talan ikki um nakað serligt stórspæl frá Neistanum sunnudagin.

Kollfirðingar vóru á vitjan, men mest av øllum, so var styrkismunurin millum liðini ov stórur, til at nakar spenningur veruliga kundi koma í dystin.

Heimamenninir vóru vaknir frá fyrsta bríksli, og áðrenn gestirnir veruliga høvdu vent sær, vóru fleiri mál á muni.

Og tað var ein munur, sum ongan tíð hevði hug at tódna. Heldur var tað hinvegin, at Neistin støðugt hótti við at talan veruliga skuldi gerast um sorl, og eina løtu í seinna hálvleiki tóktist hetta eisini skula gerast veruleiki.

Seinastu løtuna tók Neistin tó ferðina av spælinum, og so fingu gestirnir pyntað nakað um úrslitið. Men tað nart ikki niðurstøðuna um, at styrkismunurin millum hesi bæði liðini í løtuni er meira enn bara stórur.




Heini Hanusarson og liðfelagarnir í Neistanum vunnu ein tryggan sigur, tá KÍF ongan tíð megnaði at geva nakað álvarsligt mótspæl

Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

**Neistin-KÍF 36-23 (18-11)**
**10 min:** 5-2
**20 min:** 12-5
**40 min:** 25-12
**50 min:** 30-16
**Málskjúttar**
**Neistin:** David Edvardsen 8(1), Heini Hanusarson 7, Birgir Poulsen 6, Jugoslav Djumic 5, Jens Mohr 5, Beinir í Ólavstovu 3, Ingi Olsen 2
**KÍF:** Gert Hansen 5, Ingi Johannesen 4, Regin Petersen 3, Ási Dam 3(2), Áki Müller 2, Hallur Hansen 2, Suni Johannesen 1
**Brotskøst:** Neistin 1, KÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 2, KÍF 6
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

### StÍF-H71 28-22 (13-13):

## Preda bumbaði meistararnar niður

**Cristian Preda eitur nýggi stórskjúttin í bestu føroysku mansdeildini í hondbólti. Sunnudagin skeyt hann meira enn helmingin av málunum, tá H71 varð sent heim við ongum**

16 mál frá einum spælara í einum dysti. Tað er avgjørt ikki á hvørjum degi, at tað kemur fyri í bestu føroysku manskappingini í hondbólti, men tað var tað, sum Cristian Preda stóð fyri, tá StÍF tók ímóti meistarunum úr H71 sunnudagin.

Longu í fyrsta dystinum móti Kyndli vísti Preda, at hann kann gerast stórur fongur hjá strandingum, og tann metingin stendur so ruddiliga við enn.

Ógvuliga hóskandi skeyt hann bæði fyrsta og seinasta málið hjá StÍF sunnudagin, og hoyvíkingar vistu sjáldan, hvussu teir skuldu gera í roynd-unum at steðga stórskjúttanum.

Og tað var fyrst og fremst Preda, sum var munurin millum liðini. Hoyvíkingar fylgdu væl við stóran part av dystinum, hóast StÍF hevði hug at toga seg avstað, men tað var ikki fyrr enn um miðjan seinna hálvleik, at tað veruliga skrædnaði.

mørk

### FAKTA

**StÍF-H71 28-22 (13-13)**
**10 min:** 5-4
**20 min:** 10-7
**40 min:** 16-15
**50 min:** 24-17
Málskjúttar
**StÍF:** Cristian Preda 12(2), Gabriel Stanciu 7(2), Bárður B. Danielsen 1, Esbern Jacobsen 1, Mortan Hansen 1, Rúni Niclassen 1, Borgar Danielsen 1
**H71:** Poul Kjartan Dam 7(4), Bárður Brimvík 4, Janus Sørensen 3, Hans Kári Hansen 2, Tróndur Vatnhamar 2, Dánial Tórgarð 1, Gunnar Bláberg 1, Dánial Kjærbo 1, Rúni Højgaard 1
**Brotskøst:** StÍF 5, H71 5
**Útvísingar:** StÍF 5, H71 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### FAKTA

**VÍF-Kyndil 29-31 (16-12)**
**10 min:** 6-4
**20 min:** 11-8
**40 min:** 20-18
**50 min:** 22-23
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 12(4), Agnar Joensen 7, Regin Joensen 4, Joen P. Høgnesen 2, Bjarti Hansen 2, Áki G. Olsen 1, Sjúrður Poulsen 1
**Kyndil:** Janus Einar Sørensen 7, Bárður Johannesen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 5(1), Høgni Klein Olsen 3, Julian Johansen 2, Josef Abrahamsen 2(1), Ken Zachariassen 1
**Brotskøst:** VÍF 5, Kyndil 3
**Útvísingar:** VÍF 2, Kyndil 5
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

### VÍF-Kyndil 29-31 (16-12):

# Kyndil er aftur við

**Eftir eitt ár í dvala, er Kyndil um at vakna aftur. Sunnudagin vunnu teir á útivølli móti VÍF**

Kyndil hevði í fjør eitt av sínum heldur lakaru kappingarárum. Hóast teir vunnu seg í finaluna í steypakappingini, har teir taptu tepurt, so var avrikið í landskappingini ikki av tí slagnum, sum er Kyndil so øgiliga líkt.

Í stóran mun var orsøkin tá, at stuðulsspælarar ikki longur vóru á liðnum, sum hevði ein sera tunnan hóp, men tann parturin tykist nú vera broyttur.

Høgni Klein og Josef Abrahamsen eru nú aftur at síggja á liðnum, og landsliðsbólturin í fjør hevur givið Bárði Johannesen hug at halda fram við hondbóltinum.

Og á vøllinum sæst eisini aftur, at royndirnar nú eru fleiri. Hóast VÍF stóran part av dystinum í gjár var við yvirlutan, so fullu teir hjá Kyndli ongan tíð í fátt. Eftir steðgin settu teir veruliga ferð á, og alt fyri eitt ótu teir seg framum vestmenningarnar. Ein støða, sum teir ongan tíð sleptu aftur í dystinum.

mørk